

*Meðan árið í fjør ikki royndist nakað serligt hjá Viking Seafood, sær betri út rakstrarliga í ár. - Í ár er líkt til, at vit fáa tað at hanga saman fíggjarliga, sigur stjórin, Brandur Jacobsen*

eisini á Gøtuvík, og ein stórur partur av laksinum, vit hava tikið higartil í ár, er komin haðani.

Feløgini hava í løtuni smáan laks gangandi á Kaldbaksfirði, sum verður tikin næsta ár.

- Sum er, verður framleiðslunøgdin á leið hin sama tey næstu árini, men vit kundu hugsað okkum at hava okkurt øki fast aftrat. Tað er ikki optimalt at hava tvey føst aliøki, tá skipanin er, at tú setir út og tømir økið aftur, og síðan setir tú útaftur á einum øðrum øki og tømir tað.

Brandur vísir á, at skipanin er soleiðis til tess at byrgja uppfyri sjúkum, sum alarar alla tíðina óttast.

- Tað er soleiðis, at tá vit koyra við skiftisøkjaskipan í alivinnuni, er neyðugt at hava í minsta lagi trý økir fyri at hava stabilitet í virkseminum, sigur hann.

## Slopnir væl

Føroyskir alarar eru tíbetur slopnir væl við sjúkum og felli seinastu árini, síðan alivinnan reisti seg aftur. Hinvegin hevur ila-sjúkan gjørt nógv um seg í eitt nú Chili, har hon hevur jarðlagt ein stóran part av alivinnuni.

- Chili hevur eina velduga langa strond, men alingin er savnað á einum lutfalsliga lítlum øki. Hetta er helst orsøkin til, at ila-smittan hevur gjørt so nógv um seg.

Brandur Jacobsen sigur, at samstundis, sum líkt er til, at norðmenn hava fingið bilbukt við ila-smittuni, eru teir vorðnir raktir av nýggjum sjúkum, eitt nú PD.

- Eg veit lítið og einki um hesa sjúku annað enn, eg havi lisið um hana, men sum eg havi skilt, hevur hon rakt norsku alingina nokso meint og er ikki ólík ila-sjúkuni í so máta, sigur stjórin á Viking Seafood.



*- Prísirnir á sílum hava verið so sum so, men í ár sær heldur frægari út, samstundis sum prísirnir á laksi hava verið rímiligir, sigur Brandur Jacobsen*